Sæð á Facebook:
»Tað er í lagið, at tú ert ósamdur við mær. Eg kann sjálvandi ikki noyða teg til at hava rætt.«

Sæð á Facebook:
»Um tjúgu ár fara tey, sum eru børn nú at siga, at tað altíð var nógv meiri kavi fyrr..«

1825,5 *tons av salti eru í vetur stroydd á føroysku vegirnar*

Kjartan og Sofía á Århus Teater





Århus Teater kunngjørdi í vikuni, at føroysku sjónleikararnir Kjartan Hansen og Sofía Nolsøe Mikkelsen vera við í leikbólkinum, sum skal virka á teatrinum í 2015/16.

Århus teater er eitt viðurkent leikhús, og fleiri føroyskir sjónleikarar hava áður havt tilknýti til húsið. Eisini Eyðun Johannesen, leikstjóri, hevur stigið mangt sporið har.

Teaturstjórin Mick Gordon hevur lagt seg eftir at kunna presentera eina breiða viftu av talentum. Hann hevur níggju fólk í starvi, harav fimm eru nýggj. Teirra millum Kjartan og Sofía.

Um Sofíu sigur Mick Gordon soleiðis:

Sofía er ikki bert ein fantastiskur leikari, hon er eisini ein sterkur sangari. Eftirsum vit hava ætlanir um at hava ymisk sløg av tónleikateatri komandi tvey árini, er tað týdningarmikið.

Um Kjartan sigur hann soleiðis:

Vit hava eisini tørv á typum sum Kjartan, sum hava nógvar royndir við eksperimenterandi leiki á smáum pallum. Vit fara at gera eksperimenterandi teatur, og tískil hava vit tørv á fólki, sum eru von at arbeiða soleiðis.

Ensemblið fer at vera tókt at kunna arbeiða innan film og sjónvarp. Hetta er fyri leikarar, sum vilja nýta tvey ár av teirra lívi til at vera ein partur av einum toymi. So tá eg seti ensemblið saman hyggi eg serliga eftir yngri leikarum, sum fara at gerast morgindagsins stjørnur, sigur stjórin á Århus Teater.

Visti tú?
11% av øllum fólkum eru lámar



Teitur verður Ted-tosari

»Eg kenni meg sera æraðan og ernan at verða ein av Ted-tosarunum í ár. Og ja – eg eri eisini fjálturstungin!«

»Ted talk« er ein røð av smáum fyrilestrum, sum leik og lærd halda ókeypis um evni, sum kunnu vera áhugaverd, vikomandi og inspirerandi hjá øðrum at hoyra.

Í ár er evnið Truth or dare, og Teitur skrivar á heimasíðu síni, at hann heldur hetta evnið vera sera áugavert. Í ár verða fyrilestrarnir filmaðir í mars í Vancouver.

– Kenni meg fjálturstungnan at skula halda ein Ted fyrilestur, sigur Teitur á heimasíðu síni SOPHIE HABER

Vikan ið fór
...uppá ein minutt

Eyðun Mørkøre, stjóri á TAKS, og Atli Gregersen, stjóri á Hiddenfjord, vóru kosnir ársins almenni og privati leiðari á Leiðaradegnum.

Nógvur vindur gjørdi um seg fríggjadagin og landsvegurin við Gøtugjógv varð stongdur eina løtu, tá eitt seyðahús var farið í luftina og vrakpetti lógu á vegnum.

34 ára gamli Regin Marnerson, skúlastjóri á Giljanesi, varð settur sum nýggjur stjóri á Námi.

Ógvusligt kavaveður legði tað mesta av samferðsluni lamið mánadagin og um alt landið stóðu bilar fastir í nógva kavanum.

Landsverk og løgregla heittu um fólk ikki at fara út at koyra.

Løgmansskrivstovan vann rættarmálið um løggildingina hjá grannskoðarunum, ið sostatt mugu taka neyðugu royndirnar fyri at fáa løggildin.

Kringvarp Føroya sendi fyrsta part í dokumentarinum um makrelfiskiskapin undir Føroyum "Landstýrisútnevndir milliardingar."

Ovi Brim verður settur sum prestur í Nes prestagjaldið. Kæran frá einum øðrum umsøkjara vinnur tí ikki fram. HB vann VFF-kappingina á Tórsvølli fyri triðju ferð á rað.

MEST NÝTTA ORÐIÐ HESA VIKUNA


»Makrelur«

Makrelur: *(fisk.) feitur fiskur (vanl. nýttur til agns) (Scomber scombrus); sbr. rossa-*



Sendingin milliardingar«, sum var í Kringvarpinum mánakvøldið, setti aftur makrelin á dagsskrá í Føroyum. Síðani sendingina hevur verið tosað um makrel-milliardingar, makrelloyvi, makrelpolitikk, makrel-samgongu, makrelfiskiskap, makrelfamiljur, makrelvirki, makrelvirking, makrelkvotur, makrelkorruptión, makrelpengar, makrelavkast, makrelbarónar...





Hósdagin seinnapart:
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

Fríggjadagin:
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av vestri og ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

Leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitalagið millum 0 og 3 stig.

Sunnudagin og mánadagin:
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av vestri og útsynningi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 3 og 7 stig.